# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Privatisering

Løgmaður var herfyri endurgivin í samband við privatiseringar fyri at siga, at tað almenna ikki skuldi reka vinnuvirksemi. Hesin hugburður er rættiliga útbreiddur og er ma. komin av, at man fyri eini 20 til 30 árum síðani sá eina massiva almenna uppíblanding í vinnulívið. Máti skal sum kunnugt verða við øllum, men frá massivari uppíblanding til einki alment vinnuvirksemi er eitt langt lop.

Um politikarar altíð høvdu havt henda hugburð, so høvdu vit enn dúvað uppá Mærsk og DFDS sum samband til útheimin og standurin á mongum smáplássi og útoyggj hevði verið betýðiligt verri, enn hann er í dag. Ótrúliga skjótt sum fólk gloyma, hvussu tilafturskomið Føroyar var við sambandi til útheimin og innanoyggja fyri einans 20 - 30 árum síðani, tí at tað privata initativið ikki rakk til.

Eitt er, at ungfólk og almenningurin gloymir hetta. Eitt annað er, at ein flokkur sum Javnaðarflokkurin, sum kann taka sær sín part av heiðurinum fyri ein stóran part av sjeymílalopunum í okkara sambandi innanoyggja og við útheimin, skal gloyma hetta. Hesi framstig høvdu ongantíð verið komin við einum "landið skal als ikki reka vinnuvirksemi" hugburði. Eitt er at summir borgarligir flokkar hava tað sum prinsipp, men Javnaðarflokkurin er ikki ein borgarligur flokkur og, hóast ikki tilhangari av almennari involvering í alla vinnu, so hevur tað júst verið eitt kennitekin við javnaðarpolitikki, at man ikki hevur havt ein svart hvítan holdning til hesi ting. Hetta tykist løgmaður hava gloymt.

Hvussu verður vinnuvirksemi definerað? Er tað tunnilsrakstur? Tað tykist verða hugburðurin í Javnaðarflokkinum, tá vit hoyra formannin í tingbólkinum tosa um at selja undirsjóvartunlar til privat. Skulu norðoyingar og vágamenn verða undirlagdir bummpengatakstirnar hjá einum privatum monopoli í allar ævir? Skulu vit eisini selja tunnilin millum Kaldbaksbotn og Kollafjørð, so onkur kann seta ein bumm á, fyri at vit onnur skulu gjalda fyri at sleppa at koyra á tí, sum plagdi at verða landsvegur í orðsins rætta týdningi?

Vit eiga annars at fanga tey signal úr útheiminum, har privatisering av almennum fyritøkum hevur givið bæði góð og ring úrslit og síðani læra av teimum royndunum.

**Sosialurin**

# Tørvar okkum eina mentannarliga kollvelting?

EYÐUN MOHR VIDERØ

Tað er helst eitt ellisbrek, at ein tímir at hefta seg við samfelagsligu smálutirnar í størri høpi, men eg kann ikki lata vera!

Sjálvsagt henda alla tíðina broytingar í samfelagnum, sum vit skulu laga okkum til. Bæði innan- og uttanlands hendir mangt og hvat vinnuliga, tøkniliga og mentanarliga, og sum partur í heildini mugu vit laga okkum og taka støðu til broytingarnar.

Her hendir mangt og hvat heima. Havi í øðrum høpi nevnt, hvussu sór krøv verða sett til starvsfólk, sum kunnu verða sett í starv í almennu umsitingini, men havi sett spurnartekin við, hvussu nógv eitt skúlaprógv er vert, um einki høvd fylgir við! Hygg bert eftir, hvussu nógv Umboðsmaðurin hevur at gera og átala, tí hesi væl skúlaðu fólkini ikki eru før fyri at gera sína skyldu! Hví?

Okkara løggevandi løgting haldi eg er sokkið so djúpt í orðavali og hugsanarhótti í samband við viðger av løggávu og reglum fyri okkum landsmenn, at tað er skelkandi! Hví?

Einasta mál í samfelagnum, ið verður sømuliga, væl og virðiliga viðgjørt, er ítrótturin, og serliga fótbólturin. Hetta er gott og væl, men tá henda viðgerð bert kann sigast at vera nøktandi um fótbólt, so er eisini vert at undirstrika, at hetta snýr seg um "fótatraðk"!? Hví?

Ein afturvendandi spurningur er alla tíðina um at fáa nokk av løn t.v.s. meir, men tá verður ikki hugsað um størri avrik! Ongin verulig viðgerð fer fram í fjølmiðlunum ella innan tinggátt! Hví?

Ein skrivandi maður, Carl Johan Jensen, trínur fram og sigur, at "eingin" dugir at skriva, uttan hann sjálvur! Hvar er viðgerðin farin fram, um hetta er rætt, ella um hann við hesum roynir at krógva seg, tí hann sjálvur ikki dugir at skriva? Sá og hoyrdi upplestur hansara í sjónvarpssendingini, men eg skilti einki! Men hvar er gali? Hjá mær ella honum? Hetta mátti verið eitt upplagt evni hjá fjølmiðlunum, men haðan kemur einki! Hví?

Okkara kommunustýri á Sandi síggja vit játtar stórar upphæddir til vælgerandi endamál, tó uttan at vit borgarar hava fingið møguleika at gera okkum kunnugar við fíggjarætlanina fyri 2006, samstundis sum henda fíggjarliga tungt koyrandi kommuna hevur fingið fíggjarliga hjálp frá øðrum kommunum í landinum í kreppuárunum í 1990-unum, hevur hægsta skattaprosent-24- og hevur fingið játtan frá Føroya Banka um, at hesin skal fíggja avdráttirnar í Kommunekredit, og geva Sands Kommunu ein avdráttarskáa í fíra ár, soleiðis at skuld kommununnar veksir tilsvarandi!! Hevur landsstýrið góðkent hesa mannagongd, og hevur kommunustýrið góða samvitsku?? Hví?

Okkara tjóðskaparligi samleiki líður undir stórum trýsti í hesum døgum. Eg hoyri onga tænandi rødd, bert hjálparleys skríggj, men frá tí, ið ongan rygg hevur, væntast einki!

Tað er væl ikki so gali, at einasta sæluskapandi bjarging er, um útlendingar við fíggjarligum trýsti klára at tvinga Føroya Løgting at seta eina "reyvagrein" inn í revsilógina!

# Skylda landsins mótvegis útoyggjunum at veita teimum betri ferðasamband!

ANNA ÁARBERG

Í fjølmiðlunum hoyrist og sæst javnan um berghol, undirsjóartunlar og nýggjar ferjur, sum skulu gerast ymsastaðni í landinum: sandoyingar skulu hava undirsjóartunnil, møguliga við einum avstikkara upp í Hest, undirsjóartunnil skal gerast undir Skálafjørðin, soleiðis at tað einans tekur 10 minuttir hjá fólki har at koyra til Havnar, berghol skal gerast norður um fjall á Borðoynni, ístaðin fyri tey bæði smølu og ótíðarhóskandi bergholini, sum hava verðið nýtt síðani einaferð í 1960-unum, berghol skal gerast úr Hvannasundi norður til Viðareiðis, nólsoyingar skulu hava nýggja ferju, Sam skal gera eyka túr út í Kallsoynna, so fólkið har kann ganga til ymisk frítíðarítriv inni á meginøkinum, Smyril skal gera ein eyka túr til Suðuroyar, soleiðis at ítróttarfólk kann koma aftur og fram o.s.fr., o.s.fr., sumt meira átroðkandi enn annað.

Men bergholið og ferjulegan, sum svínoyingar hava søkt um í skjótt rættuliga nógv ár, verða so at siga ikki tikin upp á tunguna. Jú, peningur er vistnokk settur av til ymiskar kanningar, og onkrar kanningar eru nokk eisini gjørdar, men tað gongur alt, alt ov seint fyri seg. Tað er nú, beinanvegin at okkurt má henda. Um orsøkin til tann væntandi viljan at gera nakað er tann, at vit ongan politikkara eiga, sum talar okkara søk, skal eg lata verða ósagt, men nógv er,sum bendir á, at so er.

Havandi í huga, at hetta ikki er ein marglatistrupulleiki, svínoyingar berjast við, men ein spurningur hjá Svínoynni at yvirliva sum samfelag, er tað óskiljandi at viljin hjá politikarunum ikki er størri at gera nakað munagott. Atkvøðurnar eru kanska ov fáar! Tað verður ofta havt á lofti, at tað nyttar onki at gera nakað, tað er ov seint, ov fá fólk, hvør tímir at flyta útaftur, bygdin doyr út allíkavæl – jú, argumentini eru allarhelst nógv fyri ikki at gera nakað – og, gaman í, best hevði verðið, um bergholið og ferjulegan vórðu gjørd fyri 20 árum síðani (so hevði støðan ikki verið so ring, sum hon er í dag), men tað kunnu vit ikki hanga okkum í nú. Nú ræður um at hyggja frameftir og fáa sum frægast burturúr.

Undirritaða kann í øllum førum tosa fyri seg, at varð ferðasambandið betur, so var tað slettis ikki óhugsandi at havt fastan bústað úti í Svínoy. Og eg rokni ikki við, at eg eri tann einasta.

So, góðu politikkarir, leggi nalvaskoðanina til síðis og arbeiði fyri øllum landinum, eisini útoyggjunum. Útoyggjafólk eru eisini skattgjaldarir, minnist til tað. Tá tað kemur til menning av útjaðaranum/ útoyggjunum, so eru tit dumpaðir, so tað stendur eftir. Sjálvt PISA- kanningin er eitt ljós afturímóti.

Føroyar verða so nógv fátækari, um útoyggjarnar verða avoyddar!

Tað hevði kanska verðið eitt gott hugskot at alt løgtingið og landsstýrið við fóru eina útferð, hendan útferðin skuldi verðið ein vetrardag, tá høgættirnar leika á norðanfyri, flutningsfarið skuldi verðið Másin, og leiðin, ja - hon skuldi verðið runt Svínoynna.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.